# Torført er at steðga eini superhetju

**Superhero bardist ímóti tøkniligum og metereologiskum forðingum, og megnaði sum fyrsti bólkur veruliga at seta lív í fjøldina á graslíkisvøllinum aftan fyri Kelduna.**

UMMÆLI
*Niels Uni Dam*
*post@sosialurin.fo*

Skotski rokkbólkurin Superhero hevði ferðast í tvey og eitt hálvt døgn fyri at koma á Fjarðafestivalin, og sambært bólkinum sjálvum var tað bert orsakað av einum góðum blandi av dugna- og ørskapi hjá føroysku flogmanningini, at teir komu vegin fram. Teir komu tó ikki á festivaløkið fyrr enn í síðstu løtu, einans átta minuttir áðrenn teir skuldu hava ljóðroynd, var bólkurin í Skálabotni. Men teir komu fram, og tað var gleðiligt, tí hóast bólkurin var merktur av longu ferðini, var framførslan ein rættiliga jalig uppliving. Hetta var fyrsti bólkur, ið veruliga fekk lív í fjøldina uttan fyri Kelduna. Fólk vaggaðu við, hoppaðu og veipaðu við ørmunum. Endiliga var veruligur konsertstemningur við útipallin. Hetta hóast fólkamongdin ikki var serliga stór leygarkvøldið.

## Skerd superhetja

Superhero kom á Fjarðafestivalin, sum ein nógv skerdur bólkur, gittarleikarin Gavin gjørdist álvarsliga sjúkur í lungunum fyri nøkrum vikum síðan, og fekk forboð at flúgva í átta vikur. Hann slapp tí ikki við á ferðina, ið bólkurin sjálvur vildi vera við, at teir høvdu glett seg til. Ráð vóru tó fyri hetta, og ein vinmaður hjá bólkinum var biðin sum avloysari. Tveir dagar áðrenn fráferðina, gjørdist hesin tó mateitraður og mátti eisini avlýsa ferðina. Tí var bólkurin um at avlýsa, men fyrireikararnir á Fjarðafestivalinum fingu teir at koma alíkavæl.

## Teknikkurin var ímóti

Umframt ferðina og sjúku var teknikkurin ímóti bólkinum. Ljómborðið helt uppat við at rigga beint áðrenn konsertina, hetta seinkaði konsertini nógv. Áskoðararnir, ið vóru savnaðir at hyggja at fýrverkinum, ið skuldi hita upp fyri Superhero, stóðu tí og bíðaðu, meðan tøkningar bardust fyri at fáa ljómborðið at rigga. Hetta eydnaðist loksins, men sama ljómborð spældi teimum puss fleiri ferð gjøgnum framførsluna, til eitt nýtt ljómborð varð funnið. Men eisini eftir hetta vóru fleiri steðgir í framførsluni orsakað av øðrum tøkniligum trupulleikum.

## Ordiliga bretskt

Tøknin saman við regninum, ið alsamt gjørdist tættari, taldi nógv niður. Men Superhetjan royndi at berjast víðari. Tað taldi sjálvandi upp, at tónleikurin var góður og viðkomandi. Skotland hevur í hesum ártúsundinum verið ein ein tónlistarligur orkudepil, og Superhero er einki undantak. Tónleikurin var ordiliga skotskur, ella kanska heldur ordiliga bretskur, tí nakað hoyrdist av valisisku Manic Street Preachers í teirra tónleiki. Løgini vóru góð og fangandi og tíðarhóskandi.

## Stór spæligleði

Framførslan hjá Superhero var sum heild góð, hóast onkrir tónar ikki vóru heilt reinir, og okkurt spæl ikki heilt í topp. Men spæligleðin var eyðsýnd, og framførslan var undirhaldandi. Tað er sjálvandi torført at fylla ljóðmyndina út, tá høvuðsgittarleikarin manglar, tá so ljómborðið, ið skal taka sær av einum parti av hesi uppgávu er somikið svikaligt, kundi tað lætt fingið ljóðmyndina at virka sera tunna. Men hetta var bert hendinga ferð ein trupulleiki. Í móti endanum royndi Superhero, at ganda gittarleikaran framvið eini teldu. Tá hetta ikki eydnaðist, tí teknikkurin aftur var svikaligur, og tað samstundis fór at oysa niður, gjørdist tað eitt lítið sindur ov nógv av tí góða, og hesin ummælarin kreyp innar at kroka.



*Hóast tøkniliga trupulleikar og svikaligt veður vann superhero hjørtuni á áskoðarunum á Fjarðafestivalinum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Stór orka men manglandi innihald

**Mammuth lótu seg ikki ávirka av, at sera fá fólk høvdu leitað sær út at lurta eftir teimum, teir leveraðu ein serstakliga orkufulla framførslu, men gott var tað ikki.**

UMMÆLI
*Niels Uni Dam*
*post@sosialurin.fo*

Svenski tungmálmsbólkurin Mammuth skuldi upprunaliga á pall kl. 1 sunnunáttina, men afturlítandi var tað ivaleyst gott, at framførslan varð flutt, tí klokkan 1 meyð tað niður í Skálabotni. Orsakað av seinkingum í flogferðsluni varð framførslan flutt til kl. 20.45 leygarkvøldið. Men klokkum var um 21 tíðina, tá hesir tungu harrarnir fóru undir framførsluna, við bulduri og braki.

## Sum á Pop Top konsert

Framman fyri pallin stóð ein fjøld av sera ungum børnum, umleið tann nøgdin og aldurin, ið er á eini miðal Pop Top konsert. Hetta tyktist tó ikki at ávirka tónleikararnar, framførslan var serstakliga orkufull, og teir runnu sum svakir runt á pallinum. So sum so var hetta júst sum ein tílík konsert skal vera. Men hetta var tó ikki nóg mikið at bjarga konsertupplivingini, sum í besta fall gjørdist miðal hampa. Løgini vóru nærum øll sera einkisigandi. Einastu ljósu løturnar vóru tvey løg av nýggjastu fløguni, ið vóru nøkurlunda góð. So hóast bólkurin spældi væl og var orkufullur á pallinum, høvdu løgini neyvan borið til ein sigur á áðurnevndu Pop Top konsert.

## Veikur sangari

Sangarin var ikki serliga góður. Hann skrálaði rímiliga væl, men tá hann sang komu eyðsýndu manglarnir í røddini til sjóndar, og tíanverri sang hann nógv meira enn hann skrálaði. Tað sama við ringu góðskuni á løgunum, gjørdi upplivingina sera langdrigna. Ofta kann karisma bera langt, men heldur ikki á hesum økinum var oddamaðurin í Mammuth serliga væl stillaður. Jú gamaní, tað var ikki frítt, at hann líktist eitt sindur Axl Rose, men tíanverri ikki tí unga tekkiliga Axl Rose, men heldur tí gamla uppblásta Axl Rose,tá hann fyri nøkrum árum síðan royndi at enduruppfinna seg sjálvan, og tað var lítið tekkiligt.

Tann eini gittarleikarin sang eisini og hann stjól myndina frá oddamanninum, tí umframt at hann var munandi betur sangari enn oddamaðurin, var hann eisini munandi meira karismatiskur.

## Eitt løgið fyribrygdi

At ein bólkur við so stórum veikleikum skal sleppa út um svensku landoddarnar er merkisvert, og tað ørkymlaði meg at síggja at fleiri kristiligir festivalar kring Evropa hava lagt pall til teirra, og eg klári ikki at treingja tankan burt, at hesin bólkur neyvan var komin longur enn til lokala vertshúsið, um teir spældu verðsligan tónleik.



*Sangarin í Mammuth var veikasti liður í bólkinum, ið veruliga ikki hevði nógv uppá seg*
*Mynd: Álvur Haraldsen*